Sosialurin

Nr. 14 - 21. januar 2010

## Færri doyggja av hjarta-æðrasjúkum

Fyri fyrstu ferð vísa hagtøl í Danmark, at færri danir doyggja av blóðtøppi og øðrum hjarta-æðrasjúkum enn av krabbameini. Talið á fólki, sum doyggja av krabbameini, hevur verið rættiliga støðugt tey seinastu 15 árini, men í sama tíðarskeiði er talið á teimum, sum doyggja av hjarta-æðrasjúkum, minkað 38 prosent. Formaðurin í danska hjartafelagnum, Peter Clemmentsen, sigur vcið DR, at hetta kemst fyrst og fremst av betri viðgerð. Hann vísir á, at í 1995 fekk næstan eingin dani viðgerð fyri at minka kolesterolið í blóðinum. Í dag fáa næstan 500.000 danir hesa viðgerð, sigur hann.



## Betri útlit í USA

Amerikanski forsetin, Barack Obama, vissaði í gjárkvøldið amerikanska fólkið um, at tað gongur tann rætta vegin við landsins búskapi. Í samrøðu við sjónvarpið ABC segði forsetin, at hann væntar vøkstur í búskapinum í ár. Fleiri leiðandi búskaparfrøðingar taka undir við honum. Teir vænta, at vøksturin verður 2,8 prosent í ár samanborið við 2,5 prosent afturgongd í fjør. Men sambært Reuters eru amerikanararnir framvegis misnøgdir, og tað er serliga arbeiðsloysið, sum tyngir. Obama segði í gjárkvøldið, at hann skilir væl, at fólk eru ørkymlað, og at hann fer at legja alla orku í at útvega fleiri arbeiðspláss.

# Kvotur heldur enn havnir

**Enn einaferð hótta kanadiumenn við at steingja kanadiskar havnir fyri føroyskum skipum, men Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, fer heldur at velja kvotur enn havnir**

KVOTUÓSEMJA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*


*Havborg er eitt av teimum trimum eftirverandi føroysku rækjuskipunum, og teir hava stórliga brúk fyri kvotuni á Grand Bank*

Málið snýr seg um sonevnda 3L-økinum, har føroyingar fiska rækjur.

- Tað er Grand Bank økið í altjóða sjógvi uttan fyri kanadisku strondina, har vit ongantíð hava góðtikið tað býtið, sum NAFO-londini hava gjørt, og tí hava áset okkum eina kvotu á 3.000 tons, sigur Jørgen Niclasen.

Hetta verður bygt á søguligan fiskiskap, men Kanada hevur ta fatan, at teir eiga alla veiði, bæði innanfyri og uttanfyri 200 fjórðingar.

- Men hetta er jú ikki rætt. Og tað sum hendi fyrradagin heldur óvæntað var, at Kanada sendi okkum eitt skriv, har teir boðaðu frá, at um vit ikki góðtóku at fiska 300 tons í staðin fyri 3.000, stongdu teir allar kanadiskar havnir fyri føroyskum fiskiskipum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at hetta er bæði óskiljandi og óvanligt, at arbeitt verður á henda hátt, tí talan er um ein spurning fyri NAFO og ikki fyri Kanada.

- Spurningurin er tí, um vit skulu góðtaka, at kvotan verður sett niður í 300 tons og so er alt gott, ella um vit skulu halda fast. Og fyri okkum at síggja, skulu vit velja millum kvotur ella havnir, og har velja vit heilt klárt kvotur, sigur Jørgen Niclasen.

### Ikki í neyðstøðu

Hann heldur tað nytta lítið at sleppa inn í kanadiskar havnir, um skipini sigla tóm.

- Hinvegin merkir tað so, at rækjuskipini mugu sigla til Íslands ella Føroya at leggja veiðina upp, og tað er nógv mist fiskitíð og nógv sigling í tí. Men hartil er tó at siga, at tað er rættiliga dýrt at frakta veiðina heim úr Kanada, og oljan er eisini rættiliga dýr har yviri, sigur Jørgen Niclasen.

Eisini er stórur kostnaður tengdur at at flúgva manningarnar millum Føroyar og Kanada, so tá roknað verður saman heldur hann ikki, at kostnaðurin fyri føroyingar er so stórur.

- Hetta er ein støða, sum vit hava roynt áður, og vit vita, at koma føroysk skip í neyð, sleppa tey inn í kanadiska havn, so bannið er bert galdandi fyri vanligu avgreiðsluna, so sum at taka olju, vatn og proviant, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at føroyingar sjálvandi fara at royna at fáa semju í lag, men at teir altso ikki ætla at boyggja seg, serliga tí tað eru ikki kanadiumenn, sum eiga rættindini, men NAFO.

- Og eg rokni við, at føroysku reiðaríini halda tað sama sum vit, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.

# Fokus á kynslív og kynssjúkur

**Í gjár samtykti Løgtingið at Helena Dam á Neystabø skal svara einum skrivligum fyrispurningi viðvíkjandi undirvísing í kynssjúkum og kynslívi**

KYNSLÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er Bjørt Samuelsen, løgtingskvinna fyri Tjóðveldi, sum setur spurningin fram.

- Orsøkin til at eg seti hendan spurningin er, at vit hava ógvuliga høg tøl fyri kynssjúkuni klamydia í Føroyum, og tí havi eg spurt landsstýriskvinnuna í skúlamálum um sexualundirvísingina í skúlunum, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon heldur, at tað er nakað, ið bendir á, at nýtslan av hít er minkað rættiliga nógv.

- Tað er lætt at verja seg fyri klamydia, um man brúkar hít, og tá tølini fyri klamydia eru so høg ber tað boð um, at føroyskir ungdómar ikki longur eru so ansnir at brúka hít, sigur Bjørt Samuelsen.

Spurningurin er so, hvussu nógv verður gjørt við hetta í skúlunum.

- Tað er jú í stóran mun í fólkaskúlunum og í miðnámsskúlunum, at tað fæst fatur á teimum ungu, sum standa á gáttini til at byrja eitt sexlív, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon setur eisini Helenu Dam á Neystabø ein spurning um undirvísing í síni heild.

- Tann lesiætlan, sum verður fylgd í sexualundirvísing er ógvuliga gomul, og tað er vanliga lærarar í biologi, ið hava hesa undirvísingina. Tað merkir, at tað eru ikki lærarar, ið hava fingið serliga vegleiðing at undirvísa í sexualundirvísing, sigur Bjørt Samuelsen.

### Ónøgd við støðuna

Hon vísir á, at tey ungu verða yvirfloymd av tilfari um sex á internetinum.

Har finst ein rúgva, sum snýr seg um sex og sexlív, og sumt av hesum tilfarinum er avgjørt ikki egnað at verða grundleggjandi vitanin hjá teimum ungu um sex og kynslív.

- Og tí spyrji eg landsstýriskvinnuna, hvat hon ætlar at gera fyri, at undirvísingin um kynssjúkur og kynslív verður dagførd í skúlunum, sigur Bjørt Samuelsen.

Tjóðveldiskvinnan vísir til hagtøl frá landslæknanum sum vísa, at tilburðirnir av klamydia eru vaksnir rættiliga nógv.

- Tað er jú greitt tekin um, at undirvísingin svíkur onkunstaðni. Hartil finst ein serkanning, sum Malan Egholm hevur gjørt, ið vísir, at bæði næmingar og lærarar eru ónøgd við ta sexualundirvísing, sum er, sigur Bjørt Samuelsen.

Væntandi fer Helena Dam á Neystabø at svara fyrispurninginum í komandi ella í aðru viku.


*Bjørt Samuelsen hevur sett Helenu Dam á Neystabø fyrispurning um undirvísing í kynssjúkum og kynslívi*